# Barnakjóli



UPPSKRIFT:
Guðni Andreasen
MODEL:
Hanna Andreasen og Emma L. Nagurset
MYNDIR:
Álvur Haraldsen

Stødd: uml. 5-6 ár
Stokkar: rundstokkur (60 cm) nr. 6, rundstokkur (40 cm) nr. 5, rundstokkur nr. 4 (60 cm) og heklinál nr. 5.

Tógv frá Navia:
Gult: 250 gr. 3- tráðað og 150 gr. 2- tráðað
Lilla: 50 gr. 2- tráðað
Pink: 50 gr. 2 tráðað
Lime: 50 gr. 2 tráðað
Myrkagrønt: 50 gr. 3- tráðað

Kjólin verður bundin við 1 tráði Trio og 1 tráði Duo.

## Kjóli

Kasta 144 eygu á rundstokk nr. 6 og bind 12 cm páfuglamynstur.
Bind 5 umfør slætt. Set síðani 6 merkitræðrir í. 24 eygu millum hvønn merkitráð.
Bind síðani 2 eygu saman (vinstrumegin hvønn merkitráð) 6. hvørt umfar 11 ferðir, 78
eygu. Bind beint upp til arbeiðið er 54 cm.

Ermahol: Tak 6 eygu av, bind 33 eygu, tak 6 eygu av, bind 33 eygu. Legg bulin til viks,
meðan ermarnar verða bundnar.

Erma:
Erman verður bundin aftur og fram, tvs bind rætt á rættini og rangt á ranguni. Kasta 24 eygu á rundstokk nr. 6. Tak uppá við at binda hvørt eyga, 48 eygu.
Bind 2 umfør sløtt.
Bind 2 eygu saman í byrjanini á hvørjum stokki til 30 eygu resta.
Bind eina ermu aftrat.

Ranglan:
Set partarnar saman á rundstokk nr. 6 og bind runt við sløttum = 126 eygu. Set ein
merkitráð við allar samankomingarnar. Avtøkurnar til ranglan eru báðumegin við tær 4
samankomingarnar soleiðis: 1 rætt, 2 røtt saman, bind til 3 eygu eru eftir áðrenn næsta
merkitráð, tak 1 eyga av, 1 rætt, koyr tað leysa eyga yvir um tað bundna eyga, 2 røtt, 2 røtt
saman, bind til 3 eygu eru eftir áðrenn næsta merkitráð, tak 1 eyga av, 1 rætt, koyr tað
leysa eyga yvir um tað bundna eyga. Ger hesar avtøkur við hvønn merkitráð 2. hvørt
umfar 10 ferðir, 46 eygu.
Skift til rundstokk nr. 5. Bind háls 2 røtt og 2 rang, men tak 2 eygu av á 1. stokki = 44
eygu. Bind 5 umfør og læs tey 44 eyguni av.

Tilgerð: Seyma ermar og ermahol saman. Hekla ein kant runt um ermarnar.

Blómur:
Kasta 50 eygu á stokk nr 4 og bind 50 umfør slætt. Ger 3 eins stykkir við ymiskum litum. Tøv í vaskimaskinu við 60 gradum. Tekna ein stóra og eina lítla blómu á hvørt stykkið og klipp út. Brodera millefleurblómur á hvørja tøvda blómu. Trogla stelk, bløð og blómur á kjólan. Stelkur og bløð = myrkagrøn. Blómurnar verða troglaðar á við sama liti sum blómurnar. Stórar blómur framman og lítlar blómur aftan.

## Húgva

Stødd: 5-6 ár
Stokkar: rundstokkur nr 4 (40 cm) og rundstokkur nr 5½ (40 cm).
Tógv frá Navia: 3- tráðað

Kasta 60 eygu á stokk nr 4 og bind 4 umfør rond (1 rætt og 1 ragnt).
Skift til stokk nr 5½ og tak 20 eygu uppá (2 eygu ímillum hvørt eyga tú tekur uppá)= 80
eygu. Bind slætt til arbeiði er 24 cm.
Bind 2 eygu saman alt umfarið = 40 eygu. Bind næsta umfar á sama hátt, 2 eygu saman
alt umfarið = 20 eygu. Tráður verður drigin ígjøgnum tey 20 eyguni, og endin heftur.
Húgvan verður síðani prýdd við knappum.

*Páfuglamynstur*




*Millefleurblóma*





Støddin á blómunum er 1:2